*Hópur av fólki var til tey mongu tiltøkini á stóra pallinum við ferjuleguna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*






*M-kappingum í sjómansskapi leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Havhestatíðin í fjør vignaðist væl, og bátar fingu nógvan fugl*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Nú nærkast havhestatíðin

**Í komandi viku skuldu havhestaungarnir so smátt farið at flogið úr berginum og á sjógvi. Eitt sindur ymiskt kann vera, nær ungin fl‡gur út av rókini. Hetta veldst um, hvussu búgvin fuglurin er, og hvussu veðrið háttar sær í havhestatíðini**

HAVHESTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Líradagur er 26. august, og tá plagdu menn at draga líra í oyggjum, har skrápur reiðrast.

Men hetta er eisini tíðin, tá ið teir, sum ætla sær at taka havhest á sjónum, fara at rigga seg til.

Glúpurin skal finnast framaftur og eftirhyggjast, og somuleiðis skal gass og salt keypast. Íløt og annað skal verða klárt, tá ið teir fyrstu feitu fuglarnir liggja inni á gólvinum í neystinum ella í skúrinum.

### Komandi vika

Enn er nakað tíðliga at gera ta fyrstu royndina, men seinni í hesi vikuni – ella fyrst í komandi viku - loysa ivaleyst teir fyrstu bátarnir og stevna út á hav.

Besta tíðin er vanliga um mánaðarskiftið, august/september.

Havhestatíðin er ein hugnalig tíð. Menn sita í neystunum og royta og svíða, og svidnaroykurin sker í næsarnar kring um í bygdini.

Tað eru teir, sum royna at tjena sær nøkur oyru í havhestatíðini – og so eru tað aðrir, sum bara hugsa um at taka sær til húsbrúks.

Veðrið hevur alt at siga, hvussu hendan tíðin vignast.

Havhestur:

# Døpru útlitini í fjør hildu ikki

**Í fjør heyst helt fuglamaðurin, Jens-Kjeld Jensen, at útlitini fyri havhesti vóru vánalig. Hetta segði hann, eftir at hann saman við øðrum hevði kannað eftir, hvussu støðan við havhestinum var**

HAVHESTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Eg havi ikki sæð nakað líknandi seinastu 15 árini. Er støðan tann sama um alt landið, verður havhestatíðin helst sløk í ár, skrivaði Jens-Kjeld Jensen, fuglamaður, í Dimmalætting í fjør heyst.

Hann vísti á, at lundin sveik í fjør summar, og at menn meta orsøkina vera ov lítil føði við landið.

Aftur í ár sveik lundin.

Jens-Kjeld vísti í greinini á, at eins og lundin svíkur, hevur seinnu árini eisini verið líkt til, at havhesturin er í minking.

Sum tann nærlagdi fuglamaðurin, hann er, var Jens-Kjeld Jensen saman við øðrum nólsoyingum í fjør heyst, tá ið teir sigu í Grønadalsrók og Skirisvølli eystantil á Nólsoynni.

– Vanligi fongurin plagdi at vera einir 50 havhestaungar, men í ár vóru hesir einans 43 í tali. Talið 43 er ikki einki, men so er eisini alt sagt, helt fuglamaðurin fyri í greinini.

Hann vísti á, at í 10 øðrum reiðrum hevði ungi verið, men har var bara nakað av dúni eftir.

– Helst eru ungarnir í hesum reiðrum deyðir – av svongd, og síðan hava másar og aðrir fuglar etið teir.

At enda segði Jens-Kjeld Jensen seg ikki hava sæð nakað líknandi seinastu 15 árini.

– Er støðan hin sama kring alt landið, verður havhestatíðin helst sløk í ár, legði hann aftrat.



Vit kunnu leggja aftrat, at ilt er at siga, um havhesturin er í minking ella ikki, men tá ið samanum kom í fjør heyst, var havhestatíðin ikki so miseydnað kortini. Í staðin fingu einstakir bátar meira fugl enn nakrantíð áður.

So, spennandi verður at síggja, hvussu heystið fer at vignast hesaferð.